**Bjørn Kalsø**
**Jørgen Niclasen**
**Jákup Mikkelsen**
**Jógvan Skorheim**
**løgtingsmenn**

**Broytingaruppskot**
**til**
**3. viðgerð av**

**løgtingsmáli nr. 18/2017: Uppskot til løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi**

**b r o y t i n g a r u p p s k o t**

1. Í 3, nr. 5 verður aftan á "fiskifari" sett: ", sum hevur veiðiloyvi sbrt. nr. 23".

2. Í 3 verður sum nr. 23 sett:
"23) Veiðiloyvi sambært hesi lóg fyri fiskifør, onnur enn tey, ið koma undir bólk 5 sambært § 23, er góðkenning, ið landsstýrismaðurin veitir ávísum fiskifari at veiða á føroysku landleiðunum og á leiðum uttan fyri føroysku landleiðirnar."

3. Í § 5 verður aftan á "krevst," sett: "veiðiloyvið sbrt. § 3, nr. 23 og"

4. Í § 12, stk. 1 verður aftan á "uttan" sett: "veiðiloyvi og"

5. Í § 52, stk. 2 verður "Fiskiloyvi" broytt til: " Veiðiloyvi"

6. Í § 52, stk. 3 verður "fiskiloyvi" broytt til: "veiðiloyvi"

## Viðmerkingar

Síðan ætlanin hjá samgonguni at strika kravið hjá fiskiskipum um veiðiloyvi í nýggju lógini um sjófeingi kom í eyga, hava manningarfeløg, reiðarafelag og aðrir hoyringarpartar staðiliga mælt frá hesi ætlan.

Uppskotsstillararnir hava tikið undir við sera kraftmiklu og væl grundaðu frámælunum hesum viðvíkjandi, og skjóta tí upp, at veiðiloyvi framhaldandi verða partur av fiskivinnulóggávuni og lógini um skráseting av skipum.

Hetta verður millum annað gjørt fyri at:

- verja skipsmanningarnar og føroysku manningarfeløgini mótvegis økta vandanum við bíligari útlendskari arbeiðsmegi og øðrum óskipaðum manningarviðurskiftum.

- at byrgja fyri, at fleiri gomul skip, ið eru verri útgjørd at føra dygdargóða rávøru til meirvirkingar á landi í Føroyum, verða keypt/leigað inn í fiskiflotan umvegis útlendskar umboðsmenn.

- Og at byrgja fyri øðrum ótilætlaðum negativum" kreativiteti og spekulatión" við fiskirættindum og fiskiførum.

**Á Løgtingi, 12. desember 2017**

| | |
|---|---|
| Bjørn Kalsø | Jørgen Niclasen |
| Jákup Mikkelsen | Jógvan Skorheim |